*Framhald av síðu 55*

t.d. tá hann vitjaði Shanghai her fyri, ella tá hann í fjør var í Havn á almennari vitjan. Tí er hann eisini fúsur at greiða okkum frá um býin.

Hann sigur, at hann sjálvur yndar at ferðast kring býin á súkklu. Eitt nú tá hann fer frá og til arbeiðið. Men eisini í frítíðini. Í vikuskiftinum vóru hann, konan og nøkur vinfólk og súkklaðu í skóginum kring Oslo, tey súkklaðu upp á 680 metra hædd, har tey sótu og notu eina fløsku av reyðvín, og lógu nátt har, áðrenn tey súkklaðu heim aftur næsta morgun. Hetta at búgva 10 minuttir frá natúruni er stórsligið, tá tú býrt í einum stórbýi, sigur Erik, ið tó er greiður yvir at flestu føroyingar búgva styttri enn 10 minuttir frá natúruni.

Oslobúgvar liva tætt við natúrina og kenna alla tíðina hennara megi, skógurin og fjørðurin eru dragandi hvør í sínum lagi. Erik sigur, at um hann skal viðmæla eitt serligt stað, ið vitjandi áttu at upplivað í Oslo, so er tað ánna, ið rennur gjøgnum býin, Akers Elva er ein æðr í býnum og umhvørvið kring hana er sera vakurt. At ganga framvið henni ella ferðast á súkklu er eitt Eldorado av upplivingum bæði gomlum og nýggjum, sigur hann.



*Umhvørvið kring Akers Elva er eitt Eldorado av upplivingum*

5 707265 100067 >




















